# Býarverkfrøðingur ørkymlar lækna

**Søgan um nógv umtalaðu læknahølini í J. Patursonargøtu heldur fram. Fyrst var tað mannagongdin av setanini, og sjálvum hølunum, meðan nú byrja vánaligu parkeringsviðurskiftini at spøkja**



*Í veruleikanum er einki parkeringspláss til viðskiftafólkini hjá Kára Jacobsen.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

MISNØGD
*Ingrid Bjarnastein*

Sjálvt um Kári Jacobsen, kommunulækni í Havn, hevði greitt fingið lovað nýggj viðtaluhøli í sambandi við setanina hjá sær sum 9. læknin í Havn, vórðu hølini heldur givin Jensi av Rana. At Kári Jacobsen hevði verið við til at innrætta, og gera tóllista, hevði onki at siga í málinum.

Í sjálvari lýsingini eftir 9. kommunulæknanum í Havn stóð at lesa: "Nye konsultationslokaler er under opførelse i Torshavn og skulle stå klar til ibrugtagning 1. oktober 2001." Skjøl, sum Sosialurin hevur fingið innlit í, siga greitt, at nýggju viðtaluhølini í Gundadali vóru av fyrstan tíð ætlað tí 9. kommunulæknanum, Kára Jacobsen. Men býráðið samtykkir tann 4. oktober 2001, at Jenis av Rana skal flyta inn í nýggju hølini í Gundadali, og soleiðis stendur Kári Jacobsen eftir við ongum. At Kári Jacobsen fekk setanarbræv longu tann 20. august, og at hann varð biðin um hjálpa til at innrætta hølini, misti virðið, og Kári fekk at vita, at nú skuldi hann flyta inn í gomlu viðtaluhølini hjá Jensi av Rana. Høvuðsorsøkin, at Jenis av Rana vildi flyta høli, var tann, at parkeringsviðurskiftini vóru ov vánalig.

– Eg eri sera ónøgdur, at tú ikki kanst stóla uppá eina lýsing, sigur Kári Jacobsen, 9. kommunulækni í Havn.

– Tað ger, at lýsingin fær onki virði. Men um eg kendi fortreytirnar áðrenn eg søkti, so hevði eg onki havt at sagt í hesum málinum nú, men eg eri sera ónøgdur við ta viðferð eg havi fingið.

### Parkeringin ikki broytt

Uttanfyri viðtaluhølini í J. Paturssonargøtu eru fýra parkeringsbásar. Tveir av teimum verða nýttir av fólkunum, ið búgva í somu húsunum, har viðtaluhølini eru. Um læknin skal hava ein bás, og skrivarin ein, so er í veruleikanum ongin parkeringsbásur eftir til sjúklingarnar. Vanligar dagar er bert ein parkeringsbásur til sjúklingarnar, og umstøðurnar til fólk í rullustóli eru av teimum vánaligastu.

– Sjúklingar, sum koma til mín við rullustóli noyðast at blokkera bispainnkoyringina fyri at sleppa til viðtaluhølini, greiðir Kári Jacobsen frá.

– Ella noyðast teir at parkera bilin á parkeringbásinum uttanfyri hølini, og síðani koyra allanvegin runt niðan í gjøgnum brekkuna og so til hølini. Hetta ber als ikki til, og hetta býráðið kann ikki bjóða sjúklingunum so ringar umstøður.

Kári Jacobsen hevur sent umsókn til Teknisku deild á býráðnum, har hann biður um at fáa parkeringsviðurskiftini broytt. Svarið hann fekk var greitt:

Ongar broytingar skulu gerast á økinum. Tá biðið varð um eina grundgeving, sigur tekniska deild, at besta loysnin hevði verið at víðkað økið móti bispagarðinum, soleiðis at 5-6 bilar kunnu parkera á økinum, bæði til íbúð og læknaviðtaluhølini. Men henda besta loysnin samsvarar jú als ikki við brævið frá teknisku deild frammanundan, tá sagt varð, at ongar broytingar skulu gerast á økinum. Tó eru bæði brøv undirskrivað av Boða Haraldson, býarverkfrøðingi.

– Hesin parkeringstrupulleikin átti at verið loystur áðrenn eg kom her til, sigur Kári Jacobsen. – Tá lækni hevur verið her í fleiri ár undan mær, átti hetta ikki verið ein trupulleiki, sum eg skal loysa.

Sjálvt um kommunulæknin hevur fingið nei frá býráðnum ætlar hann sær ikki at gevast so. Hann sigur, at ætlanin er at halda fram við at biðja um betri umstøður til hann fær sín vilja.




# Lýsingin óheppið orðað

**Beate L. Samuelsen, formaður í Sosialu nevnd í Tórshavnar býráð, sigur, at í lýsingini eftir 9. kommunulæknanum í Havn segði ongantíð, at nýggjasti læknin skuldi hava nýggjastu høli. Lýsingin hevur heldur verið óheppið orðað**

MISNØGD
*Ingrid Bjarnastein*



– Tað varð ongantíð sagt, at nýggjasti læknin skuldi hava nýggjastu hølini, tá lýst varð eftir 9. kommunulæknanum, sigur Beate L. Samuelsen, formaður í sosialu nevnd.

– Og nú er tað einaferð soleiðis, at vit avgjørdu at geva Jenisi av Rana tey nýggju læknahølini. Hetta komst av, at hann hevur verið lækni so leingi, hevur nógvar sjúklingar og so hevur hann eisini søkt um betri hølisviðurskifti í fleiri ár.

Men viðvíkjandi parkeringsviðurskiftunum í J. Paturssonargøtu sigur Beate, at tey skulu gerast í lagi so skjótt sum møguligt. Sosiala nevnd er væl vitandi um vánaligu parkeringsviðurskiftini, og hevur hon givið byggideildini boð um at gera viðurskiftini uttanfyri betri.

– Vit hava sagt, at viðurskiftini uttanfyri skulu gerast í lagi. Sum er nú eru uttanduraviðurskiftini stak vánalig, og byggideildin hevur fingið boð um at betra tey. Kári Jacobsen fekk hølini í J. Paturssonargøtu uppá tað, at viðurskiftini uttanfyri skulu betrast, og um tað ikki verður gjørt, skal hann venda sær til býráðið, kanska borgarstjóran sjálvan, sigur Beate L. Samuelsen.



Tekniska nevnd:

# Parkeringsviðurskiftini verða ikki broytt í ár

**Boði Haraldson, býarverkfrøðingur, sigur, at peningarligar avmarkingar gera, at parkeringsviðurskiftini uttanfyri læknaviðtaluhølini verða ikki broytt í ár. – Av teimum pengunum, sum vit hava fingið tillutaðar í ár, so eru ongir pengar til at broyta parkeringsøkið, sigur Boði Haraldson**

MISNØGD
*Ingrid Bjarnastein*

– Vit hava arbeitt við málinum, men vit gera ikki meira við tað, sum er nú, sigur Boði Haraldson, býarverkfrøðingur.

– Vit hava ein fíggjarkarm, sum vit skulu halda okkum innanfyri, og vit hava fingið boð um at taka okkum av ymsum tingum í býnum, og sum er nú, so er ongin peningur til at betra um uttanduraviðurskiftini í J. Patursonargøtu. Um vit fáa meira pengar tillutaðar, so skal eg við gleði gera tað, men í síðsta enda, so botnar alt í pengunum.

Boði heldur, at tað er keðiligt, at hetta ikki verður gjørt, og eisini hevur tekniska deild sent læknanum uppskot um, hvussu hetta møguliga kann betrast, men innanfyri givnu fíggjarkarmar letur hetta seg ikki gera, í øllum førum ikki í ár.




Heðin Mortensen, bygginevndin:

# Viðurskiftini fáast í rættlag

**Heðin Mortensen, formaður í bygginevndini sigur, at tað er samtykt, at uttanduraviðurskiftini í J. Patursonargøtu skulu betrast, og tí eigur tað eisini at verða gjørt skjótast gjørligt**

MISNØGD
*Ingrid Bjarnastein*

– Um tað eru pengarnir, sum eru trupulleikin, so eiga vit at fáa teir til vega, sigur Heðin Mortensen, formaður í bygginevndini.

– Vit hava lovað læknanum, at viðurskiftini uttanfyri skulu koma í rættlag, og tí eigur hetta at verða gjørt sum skjótast.

Heðin sigur, at tað einasta at gera nú er at fáa pengingin til vega, og reisa málið politiskt, tí sum lækni uppbyggir tú tær ein kundaring, og soleiðis verður trýstið á læknan eisini størri.

– Eg skal reisa málið sjálvur á næsta fundi, vit fara at hava, sjálvt um hatta ikki rættiliga er mítt øki. Tá sagt verður, at ongir pengar eru, og ætlanin er samtykt, so kunnu vit ikki bara seta okkum hendur í favn, og siga her verður onki gjørt, tí pengarnir eru ikki til tað. Men politiskt er hatta ikki nakar trupulleiki, sigur Heðin Mortensen at enda.



